# gdini hjá Vár

**Børn við breki ganga ikki í skúla, fyri at hini børnini skulu læra at vísa fyrilit og vera fitt. Hetta siga foreldrini hjá níggju ára gomlu Signu Vár sum hevur autismu. Hóast dóttirin gongur í einum góðum skúla og góðum klassa, er føroyska skúlaskipanin í alt ov lítlan mun innrættað til, at tey veiku veruliga læra nakað**

FÓLKASKÚLIN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Dávur Eyðunsson Sørensen og Sigrun Næs Joensen fluttu til Føroya, áðrenn Signa Vár fór í fyrsta flokk, tí tey ynsktu at geva dóttir teirra eitt frítt og trygt umhvørvi. Og 9 ára gamla Signa Vár trívist væl sum granni hjá abbanum, og í Hoyvíkar skúla fær hon stuðul til læring og umstøður at spæla í frið fyri seg sjálva.

Men hóast foreldrini gleðast um, at dóttirin trívist, so eru tey eisini móð av at ganga frá hurð til hurð fyri at fáa hjálp til dóttrina, og tey vita ikki, hvussu hon mennist, tí eingin støðumeting er gjørd, síðani tey fluttu heim.

Signa Vár gongur í triðja flokki, og við síni vøkru útsjónd og blíða sinnalagi líkist hon einari heilt vanligari, fittari gentu. Men hon hevur fingið staðfest infantila autismu, sum millum mangt annað merkir, at hon ikki dugir so væl at avlesa sosialar reglar, og henni dámar best at spæla fyri seg sjálvan.

*Foreldur ganga á knøum frá Mentamálaráð til almannastovu, og mangan er tað bara sum at sláa í eina dýnu*

*Dávur*

*Tá eingin eftirmeting er í skúlunum, er ringt at vita, um Signa Vár lærir tað, sum hon skal*

*Sigrun*

## Ósjónligi veikleikin

Tað eru nógv færri gentur enn dreingir, sum hava autismu, og sagt verður, at gentur tykjast at klára seg betur, tí gentur duga betri at hava fleiri strategiir í høvdinum í senn. Men fitta fasadan fjalir eitt innara kaos, har genturnar alla tíðina royna at rokna seg fram til, hvat er best at gera, tí einki kemur náttúrligt.

Tá Signa Vár var til psykologiska kanning niðri, áðrenn tey fluttu, varð staðfest, at hon er málsliga seinment, men á ávísum økjum, t.d. visuelt og analytiskt, var hon væl framman fyri javngomul børn. Nú hevur hon gingið í skúla í tvey ár, men eins og øll hini børnini í føroyska fólkaskúlanum verður læring hennara ikki eftirmett, og foreldrini vita tí ikki, hvussu hon er fyri í mun til onnur børn.

- Eg havi ein hjálpara, tí tað er betri at hava tveir lærarar enn ein, sigur skilagóða Signa Vár.

- Tað er eisini gott, tí so kann eg duga líka væl sum hini.

Hon fortelur, at í fríkorterinum spælir hon onkuntíð við hini, men ikki við dreingirnar, sum spæla eitt fótbóltsting.

## Í skúla fyri at læra

Mamma Signu Vár, Sigrun, sigur, at hon einaferð hoyrdi ein siga, at tað var gott at børn við serligum tørvi gingu í fólkaskúlanum, tí so lærdu tey sokallaðu vanligi børnini at taka fyrilit og vera góð við tey veiku.

- Men børn við serligum tørvi ganga ikki í skúla fyri at onnur skulu læra, men fyri at tey sjálvi skulu læra, slær hon fast. Men tá eingin eftirmeting er í skúlunum, er ringt at vita, um Signa Vár lærir tað, sum hon skal.

Sigrun og Dávur hava javnan eftirspurt støðumeting av Signu Vár men higartil við ongum úrsliti. Men fyri stuttum fingu tey stuðul frá heilsusystrini á skúlanum í hesum málið, so nú er umsókn farin umvegis skúlan til Sernámsdepilin um eina fakliga kanning.

- Men eg vænti einki, sigur Sigrun og suffar.

- Nú er Signa Vár komin í triðja flokk, og tað verður so líðandi torførari fyri hana at fylgja vanligu undirvísingini, og tá stuðulin, sum klassin hevur havt í tvey ár, fer í annað starv, og skúlin skal seta nýggjan stuðul í klassan hjá dóttrini, høvdu vit ynskt, at komandi stuðulin var útlærdur lærari. Men tað kunnu vit ikki vænta, sigur Dávur.

## Tey góðu flýggja

Sigrun og Dávur hava verið glað fyri teir stuðlar, sum hava verið í klassanum og í frítíðarskúlanum. Men starvið sum stuðul er eitt ótakksamt starv, sum ikki verður virt nóg høgt, halda tey.

Stuðulstørvini eru leys størv, sum hvørki eru spennandi, trygg ella lønandi nokk fyri teir góðu lærararnar. Og Dávur skilir eisini væl, at hugurin ikki er stórur til eitt arbeiði, har skipanin í alt ov lítlan mun stuðlar upp-undir arbeiðið við tí einstaka barninum.

Og umleggingin av allari stuðulsskipanini, sum var framd fyri stuttum, hevur bara verið til tað verra.

- Signa Vár hevði verðins besta stuðul í frítíðarskúlanum, vit kunnaðu hana regluliga um, hvussu tað gekk heima við hús, og hon fortaldi okkum, um hvussu tað gekk í frítíðarsskúlanum. Og Signa Vár kendi seg tryggan hjá henni, greiðir Sigrun frá.

Men so var skipanin umløgd, soleiðis at stuðulin ikki longur var knýtt at ávísum børnum og foreldrum, men heldur stovninum. Hetta broytti støðuna fullkomiliga. Gamla virkandi skipanin, upparbeidd gjøgnum fleiri ár, var tileinkisgjørd uttan at nakað munagott var klárt at seta ístaðin og við nógvum órógvi til fylgju.

Og stutt eftir segði góði stuðulin upp, sigur Sigrun.

## Sakna kunning

Sigrun og Dávur fylgja væl við í, hvussu Signa Vár hevur tað í skúlanum, og tey hava stríðst fyri at hon fær umstøður at læra.

- Alt annað hevði verið skeivt, sigur Sigrun, mann kann ikki skúgva alt yvir á skúlan, mann skal sjálvur vera virkin í gongdini. Men samstundis halda tey ikki tað kann vera rætt, at bara tey foreldur, sum berjast við hond og fót, fáa neyðugu kunningina um hvat ber til og ikki.

- Eg kann ikki ímynda mær, hvussu tað hevði verið, um vit ikki høvdu fingið diagnosuna, áðrenn vit fluttu heim. Tí niðri fingu vit beint aftaná diagnosuna bæði psykologhjálp og kunning um teir møguleikar og rættindi, sum Signa Vár hevur, greiðir pápin frá. Men tað kemur ikki fyri her.

Hann er skrivari í Landsfelagnum fyri fólk við autismu, og har hevur hann hoyrt ræðusøgur um foreldur, sum eftir at diagnosan er staðfest, fáa ein faldara og boð um at fara heim og vera góð við barnið. Einki meir!

- Foreldur ganga á knøum frá Mentamálaráð til almannastovu, og mangan er tað bara sum at sláa í eina dýnu. Og hvør orkar tað, tá ið tú júst hevur fingið staðfest, at barn títt ber brek, spyrja Dávur og Sigrun.

# Løgtingslimur ákærir mentamálaráðið

**Finnur Helmsdal, sosialráðgevi og løgtingslimur fyri Tjóðveldi reisti í lesarabrævið í gjár álvarsligar ákærur ímóti Mentamálaráðnum, sum, hann sigur, svíkur tey veiku børnini**

FÓLKASKÚLIN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Finnur Helmsdal sigur í lesarabrævi sínum, at hóast vit hava nógvar góðar skúlar og dugnaligir lærarar, so eru tað nógv børn í Føroyum, sum als ikki fáa møguleika at læra, búnast og mennast.

- Fólkaskúlin hevur ein serstakliga veikan lið, og tað eru børnini, ið ikki hava bestu fakligar, andaligar og sosialar førleikar, børn við ADHD, børn við Asberger syndromi ella øðrum líknandi í autismuspektrinum, børn sum eru orðblind, ella børn við trupulleikum, sum eingin rættiliga megnar at navngeva, sigur Finnur Helmsdal í lesarabrævinum.

Skúlaskipanin okkara stórt sæð einki tilboð til hesi børnini, hvørki innan fólkaskúlagátt ella uttanfyri. Og úrslitið av hesum eru børn, sum einki hava lært og sum ikki eru tillagaðaði ella fyrireikaði til at fara út í samfelagið.

Ábyrgdina fyri hesum oyðiløgdu lívum eiga ikki einstaku skúlarnir og lærarnir, men politikarnir, sum lóggeva, og Mentamálaráðið, sum umsitur økið.

## Vøkur orð

Fólkaskúlalógin frá 1997 staðfestir, at Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Og hetta skal gerast við at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúphugsan, at næmingarnir kunnu menna sína samkenning, sítt hugflog og hug at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan, og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

Trupulleikin er, sigur Finnur Helmsdal, at endamálsorðingin er skrivað av eftir til dømis øðrum norðurlendskum fólkaskúlalógum. Orðini eru vøkur, men tey hava ongantíð fingið føroyskt rótfesti, og tí passa orð og veruleiki ikki saman.

## Sansaleyst mentamálaráð

Men trupulleikin er eisini sjálv umsitingin í Mentamálaráðnum, har embætisfólkini eftir øllum at døma hava mist allar sansir, tá tað kemur til tey veiku børnini, heldur Finnur Helmsdal.

Hann samanber Mentamálaráðið við tær tríggjar apurnar, sum hvør í sinum lagi blokera fyri, at mest vitalu sansirnir virka. Tey síggja ikki trupulleikan, tey hava ongan tíð hoyrt um hann og tey tosa ikki um hann.

Sambært Finni Helmsdal hevur ráðið sum heild ongantíð tikið hendan trupulleika í so stórum álvara, at miðvíst og munagott arbeiði er sett ígongd, staðfestir hann og vísir á, at talið av børnum, sum antin lítla og onga ella ikki-viðkomandi undirvísing fáa, er vaksandi.

Niðurstøðan hjá Finna Helmsdal, politikara og sosialráðgeva er tí, at Mentamálaráðið svíkur bæði skúlar og lærarar, umfram sjálvandi børnini og familjur teirra.



*Sambært Finni Helmsdal, sosialráðgeva og løgtingslimi fyri Tjóðveldi, hevur Mentamálaráðið ongantíð tikið hendan trupulleika í so stórum álvara, at miðvíst og munagott arbeiði er sett ígongd*